# ítróttur

Nr. 39 • týsdagur • 26. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Landafrøðin feldi Jákup

**Eftir nærum tvey tíggju-ára skeið í nevndararbeiðinum hjá FSF segði aðalfundurin farvæl – men ikki takk – til Jákup Simonsen. Helst var tað ein blanding av landafrøðiligum og taktiskum spæli, sum feldi fyrrverandi liðleiðaran hjá landsliðnum**

NEVNDARVAL
*Jákup Mørk*

Nú skal tað vera so langt ífrá, at vit á hesum síðum skulu staðfesta, at nevndarlimirnir í Fótbóltssambandinum sita og røkja lokal áhugamál.

Tað skerst tó ikki burtur, at seinnu árini hevur tað verið ein veruleiki, at eitt ávíst landafrøðiligt býti hevur verið í, hvussu nevndarlimirnir í FSF hava verið valdir. Soleiðis var støðan tann undan aðalfundinum, at Norðoyggjar áttur ein mann (Torleif Sigurðsson), Eysturoyggin ein (Dánjal Andreasen), Sandoyggin ein (Karl Vidtfeldt), Vágoyggin ein (Jens Erik Magnussen), Suðuroyggin ein (Sveinbjørn Dánjalsson), meðan Jákup Simonsen og Mortan Poulsen so umboðaðu Streymoynna.

Tað skal tó leggjast afturat, at Suðuroyggin í veruleikanum hevði hálvan annan mann, tí Óli Holm er í løtuni í farloyvi, meðan Sveinbjørn er í nevndararbeiðinum sum kappingarleiðari , men um so er, at hann ikki heldur fram í landsstýrissessinum eftir komandi val, kemur hann av sær sjálvum aftur í nevndina hjá FSF.

### Væntaðar broytingar

Tað var tí lagt upp til broytingar, tá listin við nevndarvalevnum varð lýstur. Greitt var undir øllum umstøðum, at klaksvíkingar skuldu hava ein mann fyri Torlef Sigurðsson, ið fór frá sum formaður, og tí ivaðist fáur í, at Rúni Heinesen fór at fáa ein nevndarsess.



*Offur í taktiskum spæli? Møguliga. Undir øllum umstøðum gjørdist aðalfundurin hjá FSF leygardagin eitt farvæl til Jákup S, Simonsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Heldur ikki tóktist stórvegis ivi at valda um, hvørt Karl Vidtfeldt fór at fáa sín sess aftur.

Fyri høvuðsstaðarøkið var Christian Andreasen nýggjur kandidatur, og grundað á stuðulin, ið hann tóktist hava sum møguligt formansvalevni, so var einki at ivast í, at eisini hann fór at koma tryggur inn í nevndararbeiðið.

Hetta gjørdi, at tað mest sum var greitt, at meðan aðalfundurin fór at bjóða Christan og Rúna góðan dag, so fór talan eisini at gerast um eitt farvæl til ein av teimum trimum: Mortan Poulsen, Jákup Simonsen ella Sveinbjørn Dánjalsson. Grundað á farloyvið hjá Óla Holm tóktist tað vera lítið sannlíkt, at Sveinbjørn skuldi fara, og tí stóð valið ímillum teir báðar havnarmenninar.

### Avtalað spæl

Einki er at ivast í, at tað eisini var ein óskrivað avtala millum flestu feløgini, hvussu atkvøðurnar skuldu býtast millum valevnini.

Tað mundi vera á leið helmingurin av atkvøðuseðlunum, sum høvdu somu nøvd standandi á seðlinum. Nevnliga Christian Andreasen, Rúni Heinesen og Karl Vidtfeldt.

Eisini var skjótt greitt, at Sveinbjørn skuldi gerast fjórði maðurin, og so var spurningurin, hvørt Mortan ella Jákup skuldu missa sessin. Leingi var Mortan tann fremri av hesum, men endin varð, at tað stóð á jøvnum millum teir báðar.

Fundarstjórin skeyt tí upp, at lutur skuldi takast ímillum hesar, og tann nú fráfarni formaðurin, Torleif Sigurðsson fekk so uppgávuna at draga úr krubbuni. Á lepanum stóð Mortan Poulsen, sum soleiðis heldur fram í sínum sessi, meðan ein sjónliga vónsvikin Jákup Simonsen mátti lata nevndarsessin frá sær.

### Offraður

Um Jákup onkursvegna mundi kenna á sær, at hann varð offraður í einum taktiskum spæli, so er hetta kanska ikki uttan orsøk.

Við landafrøðiligu spjaðingini av nevndarsessunum, so var sessurin hjá Jákupi longu í vanda frá teirri løtu, at arbeiði við at koyra Christian Andreasen fram byrjaði. Tað vil siga longu seinasta heyst.

Tað er heldur eingin loyna, at millum tey, sum arbeiddu fyri uppstillingini hjá Christiani Andreasen, vóru eisini havnarfeløgini, so uttan iva hevur Christian Andreasen vigað meira enn Jákup Simonsen ella Mortan Poulsen á vektini hjá havnarfeløgunum. Møguliga eisini grundað á leiklutin hjá kappingarnevndini, sum fleiri ferðir í farna kappingarárinum var í andgletti.

Aðra staðni á hesum síðum nevndir fyrrverandi formaðurin í FSF, at tað var betri at fara frá sjálvboðin, áðrenn mann varð varpaður úr, og tað er væl møguligt, at Jákup átti at sæð skriftina á vegginum undan nevndarvalinum. Ístaðin gjørdist talan um eitt lítið virðiligt farvæl til ein nevndarlim, sum í nærum tvey tíggjuára skeið hevur røkt álitissessir í fótbóltssambandinum.



*Christian Andreasen, nývaldur nevndarlimur í FSF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Rúni Heinesen, nývaldur nevndarlimur í FSF*

*Myd: www.ki-klaksiv.fo*



# Skála fær elddóp í Klaksvík

**Spildurnýggja liðið skal spæla fyrsta landskappingardystin á útivølli ímóti KÍ. TB leggur fyri ímóti EB/Streymi, meðan meistararnir úr B36 fáa vitjan av NSÍ**

LANDSKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Nýggja liðið í 1. deild fær sama mótstøðufelag í fyrsta umfarinum í landskappingini, sum teir í fjør høvdu í síðsta umfarinum í 2. deild. Í fjør vunnu teir í 18. umfarinum í 2. deild stórt á heimavølli ímóti KÍ.

Eftir endaumfarið ímóti B71 var greitt, at Skála skuldi royna seg í bestu deildini. Sunnudagin 5. mai verður fyrsta uppgávan á skránni. Tá skal Skála á útivølli spæla ímóti KÍ.

Fyri Skála kann avbjóðingin kanska tykjast stór, men uppgávan fer ivaleyst at kennast meiri tyngjandi fyri Kurt Mørkøre og hansara menn. Fyri Skála fer tað neyvan at kennast sum tann stóri skaðin, um teir ikki fáa stig við aftur úr Klaksvík. Fáa teir eitt, so er tað fínt, og fáa vinna teir og fáa øll, so verður tað framúr. KÍ ætlar sær at vera við til at seta dám á landskappingina. Og um tað skal eydnast, so er tað einki sum eitur. Teir mugu fáa øll stigini á heimavølli ímóti uppflytarunum. Fáa teir ikki tað, so verður tað einki minni enn ein skandala.

Hitt nýggja liðið í bestu deildini er ein gamal kenningur. Hjá tvørámonnum kann tað ivaleyst fara at kennast sum ein lykladystur, tá teir í fyrsta umfarinum fáa vitjan av EB/Streymi.

Meistaraliðið úr B36 var í fyrsta umfarinum í fjør í Runavík, har tað endaði málleyst. Nú skulu teir spæla á heimavølli ímóti fyrrverandi liðfelaganum Pól Thorsteinsson, sum nú er við til at manna NSÍ liðið. Hjá Jógvan Martini Olsen man tað neyvan kennast óheppið, at fyrsta royndin hjá hansara monnum verður á útivølli ímóti B36. Um NSÍ fær stig burturúr, er tað væl klárað. Um teir tapa, so er tað væl at liva við.

Allir dystirnir í fyrsta umfarinum eru sera áhugaverdir: B68 fær vitjan av HB, GÍ og Popczynski fáa vitjan av VB.

Síðsta umfarið í 1. deild er ásett at vera leygardagin 5. oktober. Hvar tað fer at verða telvað um FM og Europa Cup pláss, og har stríðið fer at vera um at sleppa undan niðurflyting, kann hvør einstakur gera sær sínar metingar um. Dystirnir verða hesir: EB/Streymur–GÍ, TB–HB, B68–Skála, KÍ–NSÍ og B36–VB.

### B71 í Gundadali

Fyrsta umfarið í 2. deild verður leygardagin 4. mai, og síðsta umfarið verður leygardagin 28. september.

Í fjør fluttu B71 og FS Vágar niður úr 1. deild. Báðir niðurflytararnir fara í ár at leggja fyri á útivølli. B71 skal spæla í Gundadali ímóti B36, sum tíðliga á árinum, tá tað framvegis eru nógvir, sum venja nógv, tí teir vóna at vinna pláss í 1. deild, plagar at hava eitt gott 2. lið. FS Vágar skal spæla í Klaksvík. Í fjør legði KÍ bragdliga fyri í 2. deild.

Hinir dystirnir verða hesir: Sumba–LÍF, ÍF–NSÍ og VB–HB.

Í síðsta umfarinum verður spælt soleiðis: B71–VB, B36–LÍF, Sumba–NSÍ, ÍF–FS Vágar og KÍ–HB. Bara fimm lið kunnu flyta upp, og í síðsta umfarinum verður tað bara í dystinum millum ÍF og FS Vágar, at bæði liðini kunnu hava teoretiskan møguleika at flyta upp.

# KÍ og EB/Streymur á norðoyarstevnu

**NSÍ skal spæla stevnudyst ímóti TB, EB/Streymur ímóti HB og VB fær vitjan av B36**

STEVNUDYSTIR
*Jóannes Hansen*

Fyri fótbóltshugaðu norðoyingarnar kastaði tað myrkan skugga yvir norðoyarstevnuna í fjør, at Kí so dyggiliga varð sett upp á pláss í stevnudystinum. Uppflytararnir úr EB/Streymi vitjaðu, teir vunnu 4–0 og fóru avstað við steypinum, sum býráðið hevði givið. Eftir summarsteðgin spældi EB/Streymur aftur klaksvíkingunum eitt puss. Teir vunnu landskappingardystin á Mølini á Eiði 4–2.

Sambært uppskotinum til kappingarskipan, sum varð býtt út á aðalfundinum hjá FSF leygardagin, so fær KÍ ein nýggjan møguleika á norðoyarstevnu ímóti EB/Streymi. Norðoyarstevnan verður 1. og 2. juni, og 2. juni er ein av teimum fimm landskappingardystunum í 1. deild tann millum KÍ og EB/Streym.

Skálafjarðarstevnan verður 15. og 16. juni. NSÍ skal 16. juni spæla landskappingardyst ímóti TB. Undanfarin ár hevur NSÍ ofta flutt stevnudystin til leygardag. Í fjør taptu teir 2–1 ímóti GÍ, sum skoraði sigursmálið í yvirtíðini.

Sundalagsstevnan verður 22. og 23. juni. Henda seinna dagin skal EB/Streymur spæla landskappingardyst á heimavølli ímóti HB. Í fjør varð dysturin fluttur til leygardag. Tá var tað eitt stórt vónbrot hjá EB/Streymi, at teir taptu 2–1 ímóti B71.

Jóansøkan verður 29. og 30. juni. Hon v erður í Vági, og VB skal sunnudagin spæla landskappingardyst ímóti B36.

Í 1. deild eru tíggju umfør undan summarsteðginum. Tað 10. er á skránni sunnudagin 7. juli. Í 2. deild eru níggju umfør á skránni undan summarsteðginum. 9. umfarið er á skránni 29. juni.

Varmakeldustevnan í Fuglafirði verður vikuskiftið 13. og 14. juli. Tað vil siga, at ÍF í 2. deild fer ikki at spæla í landskappingini á stevnuni.

# B36 er styrkt

**Bárður Mortansson er komin úr HB, og í vikuni koma tveir rumenskir leikarar til árstalsfelagið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Leingi hevur verið gitt um, hvørjar ætlanir B36 hevur um at styrkja um leikarahópin til komandi kappingarárið. Av hópinum, sum í fjør gjørdist føroyameistari, hevur talan fyri tað mesta verið um frágongd higartil, men nú er brádliga vent í holuni

### Úr HB í B36

Leygardagin skrivaðu B36 og Bárður Mortansson undir avtalu, sum bindur álopsleikarin at árstalsfelagnum komandi kappingarárið.

Bárður hevur annars verið HB'ari øll síni fótbóltsár. Hann kom á besta liðið í felagnum í 1998, og tó at hann altíð ikki hevur eins fastur millum teir fyrstu ellivu, so hevur hann átt pláss í hópinum síðani.

Sjálvur vil Bárður ikki siga nakað um orsøkina til, at hann nú fer at royna seg í B36, men fyri Sosialinum váttar hann tó, at skifti nú er veruleiki.

Har afturat fær B36 í vikuni tveir rumenskar leikarar. Vit hava áður nevnt, at felagið hevur gjørt avtalu við ein leikara, sum meira ella minni er ætlaður sum avloysari hjá Jan Guttesen. Navnið á hesum er Dino Sando, og kemur hann ætlandi til landið mikudagin.

Saman við honum kemur ein annar rumenskur leikari, men hesin er ikki heilt nýggjur í føroyskum fótbóltshøpi. Talan er um Iulian Florescu, sum annars hevur leikt við B71 seinnu árini. Bæði í fjør og í fyrraári var hann tó sera nógv plágaður av skaðum, men í B36 vóna tey, at hetta nú er søga, og at Florescu alt komandi árið fer at styrkja um miðvøllin hjá meistarunum.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur, at við hesum hevur felagið fingið endaliga leikarahópin upp á pláss til komandi avbjóðingarnar.


## Hyundai frá A-Z



NÝGGJHEIT

3 ár/ 100.000 km. virkistrygd, og 6 ára rusttrygd

Pininfarina, Italia, hevur teknað tann nýggja MPV frá HYUNDAI, ið er gjørdur til tað virknu familjuna. Innrættanin er smidlig við góðum plássi og gjørd til lagarligar loysnir, sum lætta um gerandisdagin. Ein sterk og sikkur kabina við útgerð, sum gevur tær kensluna av trygd. Motorveitingin er í topp, meðan brenniorka og ljóð eru lág. Alt hetta fæst fyri ein prís, sum er ótrúligur. Soleiðis er Matrix: Meira fyri minni

**Trygdarútgerð:** 4 airbags, elektroniskt forsterkaðar ABS-bremsur við EBD, síðustoytbjálkar úr hástyrkistáli, stoytdoyvandi tilfar í síðustolpunum, nakkastuðlar við hæddarinstilling og trýpunktselar, sum kunnu hæddarinnstillast og við kraftavmarking.

**Modellvariantar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1,6 GL bensin | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 152.750,-** |
| 1,8 GL bensin | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 162.750,-** |
| 1,5 GL. CRDI. diesel | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 175.750,-** |

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI

Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855